## Ársins Songrødd 2008 byrjar leygarkvøldið

Hevur tú hug at royna teg sum sangara, er Ársins Songrødd just ein kapping fyri teg. Onkur tekur lut bert fyri at stuttleika sær, meðan onnur veruliga ætla sær nakað meira innan tónleik. Trý undanumfør eru á skránni í ár, og tey verða í Mentanarhúsinum í Fuglafirð,TB húsinum á Tvøroyri og í Høllini á Kambsdali. Finalan verður í Høllini á Kambsdali leygarkvøldið 3. mai. Í mun til undanfarin ár er møguleiki at velja sær lag sjálvur, so ikki skuldi verið torført at funnið okkurt, ið hóskar til tín – líkamikið, um tú ert genta ella drongur, 15 ella 95 ár. Hesaferð er pláss fyri 30 luttakarum, so tað ræður um sum altíð at tekna seg til kappingina skjótast gjørligt. Hetta kanst tú gera inni á heimasíðuni, har tú eisini finnur reglar og ymiskt annað um sjálva kappingina. Seinasta freist at tekna seg til kappingina er í kvøld á midnátt. Tekning fer fram nú inni á www.songroddin.com. James Olsen verður frásøgumaður, og til finaluna verður okkurt forkunnugt undirhald. Fyrsta umfar verður leygarkvøldið 29. mars. Hini umførini verða í TB-Húsinum leygarkvøldið tann 5. apríl, í Høllini á Kambsdali leygarkvøldið tann 12. apríl. Finalan verður leygarkvøldið 3. mai í Høllini á Kambsdali kl.23:30.




# frá okkum



*– Mær hevur altíð dámt sera væl frásøgnina um fótasporini í sandinum. Hetta er ein sera góð mynd av, at Gud vil altíð vera hjá okkum, sigur Ann D. Hansen, sum verður innsett sum prestur sunnudagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

> *Eg minnist, at eg plagdi onkuntíð at seta stólar upp heima við hús og spældi, at teir vóru kirkjubeinkirnir. So prædikaði eg fyri dukkunum og ímyndaði mær soleiðis, at tær vóru kirkjufólkið*

> *Eg tók tá avgerð um, at eg sjálv altíð vildi seta Bíbliuna allarfremst, óansæð hvat onnur siga. Eg trúgvi í øllum førum tí, sum Bíblian sigur*

Tey, ið hava hoyrt hana prædika og tey sum koma at gera tað í framtíðini, verða ikki í iva um, hvørja hugsan hon hevur um Bíbliuna sum Guds orð.

Tá hon byrjaði lesturin í 1991 varð hon beinanvegin konfronterað við, hvat ymiskir persónar hildu og mettu um Bíbliuna. Atfinningar og spurningar í hesum sambandi, kunnu kanska tykjast ógvuslig fyri ein nýggjan lesandi, tí her kemur ymiskt fram sum ein kann seta spurnartekin við og sum kanska stríðir ímóti trúnni hjá teim lesandi.

- Eg tók tá avgerð um, at eg sjálv altíð vildi seta Bíbliuna allarfremst, óansæð hvat onnur siga. Eg trúgvi í øllum førum tí, sum Bíblian sigur. Tað var neyðugt at taka eina slíka avgerð tá, tí henda avgerðin má kortini takast fyrr ella seinni.

- Tað hevur sín stóra týdning, at hava álit á Guds orði, soleiðis at vit kunnu liva eitt lív í signing og í yvirflóð. Ger ein ikki tað, so rekur ein bara við streyminum!, staðfestir hon.

### Bønarsvar

Júst hetta við álitinum á Guds orð er ikki nakað, sum Ann hevur úr leysum lofti ella er nakað sum hon hevur lisið seg til.

Hon hevur sjálv verið vitni til ta kraftina og tann sannleikan, sum er í Orðinum og at tað hendir soleiðis sum skrivað stendur.

Hetta hevur hon fingið staðfest fleiri ferðir – fyrst og fremst, tá hon hevur átt tríggjar vælskaptar døtrar. Hetta álitið, bønirnar og trúnna á Orðið fekk hon kanska best at sanna, tá mamma hennara gjørdist sjúk.

- Mamma mín fekk staðfest krabbamein í nýrunum, og varð síðani løgd undir skurð. Tá læknarnir skuldu taka knykilin burtur, tá var hann ikki har! Hann var burtur!!

- Vit skulu ikki altíð vera eins og tann ivandi lærusveinurin Tummas, sum mátti síggja fyri at trúgva. Slíkt hendir, tí at tú trýrt, staðfestir hon.

### Boða orðið allastaðni

Í fyrstu syftu er Ann sett sum prestur í Suðurstreymoyar Eystara Prestagjaldi fram til hálvan august.

Hóast starvstíðin á hesum sinni er avmarkað, hevur Ann kortini sett sær eitt fyri: Hon ynskir at hitta menniskju, har tey eru í lívinum, við teirra uppgávum og avbjóðingum í gerandisdegnum.

- Her hevur prestur ein fyrimun – um eg kann siga tað so. Tí tá eg hitti fólk, so havi eg sjálv gleðiboðskapin við mær. Og faktiskt vænta fólk, at ein prestur hevur eina heilsan úr Bíbliuni við sær, sigur Ann. Og hon leggur aftrat:

- Hetta er eitt ótrúliga spennandi starv og ein fantastiskur møguleiki at kunna boða orðið soleiðis. Tað gleði eg meg til!

## Fótaspor í sandinum

Eitt av aðalmálunum í starvinum hjá Ann verður at vísa á, at Gud er við fólki óansæð kor og umstøður.

- Eingin okkara sleppur undan ringum tíðum, men tað týdningarmesta er, at Hann leiðir okkum gjøgnum tær, sigur Ann.

Myndin um fótasporini í sandinum lýsir hetta sera væl: Ein persónur kemur gangandi eftir eini sandstrond og sær fótaspor síni og tey hjá Gudi undir liðini á sær.

Einaferð hann kemur í trupulleikar, sær hann bert fótafarið eftir einum spori. Hann heldur, at hesi fótasporini eru hansara egnu og spyr tí Gud um, hvar hann var í hesum truplu tíðini. - Hví greip hann ikki inn fyri at hjálpa honum gjøgnum trupulleikarnar?

Svarið hann tá fær, sambært frásøgnini er, at hetta eina fótasporið í roynd og veru var Guds – tað merkir: at tá ringast stóð til, lyfti og bar Gud hann gjøgnum hesa tíðina.

Á henda hátt vildi Gud vísa viðkomandi á, at hann altíð er okkum við lið og ongantíð víkur frá okkum.

- At hetta er veruleikin, sær ein kanska best, tá ein er komin yvir á hina síðuna, sigur Ann D. Hansen.